Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 29. september 2020
Mál nr.: 20/00161
Málsviðgjørt: ARØ

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan (Barsilslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 7. mai 2019, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 1. ... *Stk. 2*. .... *Stk. 3.* Aftaná 14. viku eftir barnsburð hava foreldur, sum eru løntakarar, rætt til barsilsfarloyvi í upp til 42 vikur tilsamans. Foreldrini hava ikki rætt til barsilsfarloyvi samstundis eftir pkt. 1, og barsilsfarloyvið skal verða tikið innan fyri fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð, sbr. stk. 4 og § 9, stk. 7. *Stk. 4-7*.	**1.** Í § 1, stk. 3, 2. pkt. verður aftan á "§ 9, stk." sett: "6 og".
§ 9. Kvinna, sum hevur A-inntøku, og sum fer frá arbeiði orsakað av viðgongu ella barnsburði, hevur rætt til barsilspening frá tí degi, mett verður, at 4 vikur eru eftir til	**2.** Í § 9, stk. 1, 2. pkt. verður "44 vikur" broytt til: "48 vikur".

barnsburð, ella frá tí løtu, hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum, tó í fyrsta lagi frá tí degi, mett verður, at 8 vikur eru eftir til barnsburð. Eftir barnsburð hevur kvinna rætt til barsilspening í 44 vikur innan fyrstu 52 vikurnar eftir barsnburð. *Stk. 2.* Foreldrini kunnu í staðin velja, at faðirin at barninum skal vera heima hjá barninum í upp til 30 vikur, sbr. tó stk. 6 og 7, eftir 14. viku eftir barnsburð og harvið fáa barsilspening í hesum tíðarskeiði. Treytin fyri, at faðir at barni kann fá barsilspening í hesum tíðarskeiðinum, er at móðirin ikki samstundis er frá arbeiði við løn ella hevur søkt um barsilspening frá barsilsskipanini fyri hetta tíðarskeið. *Stk. 3.* .... *Stk. 4.* Hóast ásetingarnar í stk. 2 og 3 hevur faðirin rætt til barsilspening í upp til 48 vikur innan fyri 52 vikur eftir barnsburð, um mamman doyr, ella læknaváttan staðfestir, at mamman vegna álvarsliga sjúku ikki er før fyri at taka sær av barninum. Treytin fyri, at faðir at barni kann fáa barsilspening í hesum tíðarskeiðnum, er, at mamman ikki nýtir rætt sín at fáa barsilspening frá barsilsskipanini ávísa tíðarskeiðið. *Stk. 5.* .... *Stk. 6.* Fáa foreldrini 2 børn ella fleiri undir sama barnsburði, verða 4 vikur lagdar afturat teimum 30 vikunum, sum foreldrini kunnu býta sínámillum, sbrt. stk. 2. *Stk. 7.* Verður barn ella børn fødd áðrenn 32. viku í viðgonguni, verða 8 vikur lagdar afturat teimum 30 vikunum, sum foreldrini kunnu býta sínámillum, sbrt. stk. 2. *Stk. 8.* Barsilsfarloyvi við barsilsútgjaldi skal í minsta lagi vera 1 vika samanhangandi.	**3.** Í § 9, stk. 2, 1. pkt. verður “30 vikur” broytt til: “34 vikur”. **4.** Í § 9, stk. 4, 1. pkt. verður “48 vikur” broytt til: “52 vikur”. **5.** Í § 9, stk. 6 og 7 verður “30 vikunum” broytt til: “34 vikunum”.
§ 19. Gjaldið hjá teimum gjaldskyldugu er 0,71% av tí í § 18 nevnda gjaldsgrundarlagi. *Stk. 2-3.* .... *Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann við kunngerð broyta tað í stk. 1 nevnda gjald, tó ikki hægri enn 0,71%.	**6.** Í § 19, stk. 1 og 4 verður “0,71%” broytt til: “0,86%”.

Umsitingarmyndugleiki	**7.** Yvirskriftin yvir § 25 verður orðað soleiðis: "*Umsitingarmyndugleiki og kærur*"
§ 25. ... *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* Avgerðir eftir hesi lóg ella eftir reglum, settum sbrt. lógini, kunnu kærast til landsstýrismannin innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. *Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann leggja kærumyndugleikan eftir stk. 3 til annan fyrisitingarligan myndugleika, og kann samstundis áseta, at avgerðir hjá kærumyndugleikanum ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika. *Stk. 5.* Útreiðslur, ið standast av umsitingini av skipanini, verða rindaðar av landskassanum.	**8.** § 25, stk. 3 og 4 verða strikað. Stk. 5 verður eftir hetta stk. 3.
	9. Aftan á § 25 í kapittul VIII verður sett: "**§ 25 a.** Avgerðir eftir hesi lóg ella eftir reglum, settum sbrt. lógini, kunnu kærast til kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðanina um avgerðina. Avgerðir hjá kærunevndini kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika, men kunnu skjótast inn fyri Føroya Rætt. Freistin hjá landsstýrismanninum ella umsitingarmyndugleikanum sbrt. § 25 at skjóta mál inn fyri Føroya Rætt er, innan 6 mánaðir eru farnir, frá at landsstýrismaðurin ella umsitingarmyndugleikin er kunnaður um avgerðina. *Stk. 2.* Ummæli frá landsstýrismanninum ella umsitingarmyndugleikanum til kærunevndina skal vera avgreitt innan 4

	vikur. Kærunevndin kann í serligum førum leingja freistina at geva ummæli. *Stk. 3.* Kærunevndin hevur 3 limir, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og ein formann, ið skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir av landsstýrismanninum fyri 4 ár í senn, tó so at nevndarlimur verður sitandi til nýggjur er valdur. *Stk. 4.* Samstundis verða vald varafólk, sum taka sæti í nevndini, tá limi berst frá. *Stk. 5.* Nevndarlimir og varalimir fáa samsýning, sum landsstýrismaðurin ásetur.”